*Kanska mest sermerktu filmsrullurnar, ið eru komnar undan kavi í sambandi við »Føroyskar Søgur«, vórðu funnar í einum gomlum húsum í Oyndarfirði. Tað var oyndfirðingurin Julius Høgnesen, ið blaðungur flutti av landinum at læra til apotekara, sum upptók rullurnar í 1930. Fleiri av skilfólkum hansara vóru til framløguna av »Føroyskum Søgum« í Miðlahúsinum - summi vóru komin heilt úr Noregi. Filmstilfarið hjá Juliusi var tíverri ikki partur av framsýningini á ólavsøku, men samskiparin av »Føroyskar Søgur«, Uni L. Hansen, hevði eitt eintak á telduni og fekk tískil givið teimum eina eksklusiva framsýning av sermerktu upptøkunum hjá Julusi Høgnesen, ið er at finna á »Føroyskar Søgur«*



eitur á donskum, tá eg slapp at skála við Armgarð McBirnie, ið upptraðkar sum modell í mínum yndisbroti á »Føroyskar Søgur« – eitt mótashow við undirklæðum og náttkjólum á Hotel Føroyum á Kongabrúnni í 1966. Undurfull kvinna og framúrskarandi skemtisøgur um tíðina.

Sambært Thomas Bjørn Thingstrup var ferðin til Føroya eitt stórt upplivilsi, men har var eitt, sum hann legði serliga merki til.

– Tað mest irriternadi við tiltakinum var at hava Una (L. Hansen, samskipara, blaðm.) sum vert á ólavsøku. Hann blev í heilum steðgaður av fólki, ið vildu heilsa upp á og hoyra um »Føroyskar Søgur« – so kundi eg standi og bíða eftir at sleppa víðari, skemtar Thomas Bjørn Tingstrup.

## Stryktur í trúnni

Fyri Una L. Hansen, ið hevur samskipað »Føroyskar Søgur« fyri Substanz Nordisk Film, var tað sum at vera til eina sveinaroynd, tá tiltakið fór av bakkastokki í Miðlahúsinum.

– Eg skal erliga viðganga, at tað var eitt sindur av fjáltri á mær, nú vit skuldu hava fyrstu almennu sýningina av tilfarinum á »Føroyskar Søgur«. Tað er altíð trupult at lata nakað, ið ein hevur arbeitt so miðvíst við í langa tíð, frá sær. Ivin kemur altíð sníkjandi: Er tað, ið vit hava gjørt, nóg gott? Hava vit gagnnýtt frálíka men eisini sera umfatandi filmstilfarið, ið fólk hava latið okkum, nóg væl? Kundu vit ikki hava gjørt okkurt øðrvísi? Samstundis kenni eg meg ómetaliga tryggan við tilfarið á »Føroyskar Søgur«, ið eg haldi vera bæði forkunnugt og væl frágingið, og framsýningin í Miðlahúsinum á ólavsøku var við til at styrkja meg í trúnni, og tað er ómetaliga deiligt at uppliva, greiðir føroyski samskiparin frá.

– Men tað, ið hevði allarmest týdning fyri meg, var, at fleiri av teimum fólkum, ið hava hjálpt okkum so ómetaliga væl við hesi verkætlan, vóru til staðar í Miðlahúsinum til hesa fyrstu framsýning, eitt nú fyrrverandi ursmiðurin og filmsmaðurin Jákup Andreas Arge av Argjum, Daisy Sloan úr Havn og oyndfirðingurin Andreas Klein. Uttan treytaleysa álitið, ið hesi fólk og nógv onnur við teimum, hava víst okkum, so hevði tað verið ógjørligt at framleitt »Føroyskar Søgur«, staðfestir Uni L. Hansen.

»Føroyskar Søgur« verða útgivnar 19. september.

## Fakta

»Føroyskar Søgur« verða útgivnar 19. september.
Tað eru danska fraleiðslufelagið Substanz Nordisk Film og Eik Grunnurin, ið hava tikið stig til verkætlanina.
Talan er um eina DVD-útgáva við gomlum dokumentariskum filmsupptøkum, ið er upptiknar í Føroyum seinastu 100 árini. Upptøkurnar eru settar saman til 11 sjálvstøðugar søgur, ið hava eina samlaða spælitíð á 104 minuttir.
»Føroyskar Søgur« bera hóaskandi undirheitið "upplivingar úr gerandisdegnum frá 1907 til dagin í dag". Elstu upptøkurnar, ið eru funnar í sambandi við verkætlanina, eru av konganvitjanini hjá Fríðrikki kongi 8. í 1907. Samstundis undirstrikar undirheitið, at »Føroyskar Søgur« ikki er tann almenna Føroya søgan, men løtumyndir úr gerandisdegnum hjá føroyingum seinastu øldina.
Allar tær hundraðtals filmsrullurnar, ið eru innsavnaðar til verkætlanina frá privatum og almennum gloymslum, eru allar talgildar og verða handaðar føroyskum skjalagoymslum, so tær kunnu vera til gagn hjá komandi ættarliðnum av føroyingum. Harvið er føroyski mentanararvurin á filmi eisini varðveittur fyri eftirtíðina.

*Les meira um verkætlanina á: www.substanz.dk & www.eik.fo*



*Fleiri hundrað nýttu høvi á ólavsøku at síggja Føroyar Søgur í Miðlahúsinum*